# Skálaberg vann aftur í ár sjómannafótbóltin í Klaksvík



*Palli Ziskason, sum hevur verið knýttur at reiðaríðnum P/F Christian í Grótinum hevur skipað fyri kappingini - nú á 10. ári - Hann roynir her at stilla liðið hjá Skálaberg vakurt upp til myndatøkuna*
*Mynd: Dávur Winther*

**Tann stóra innandura fótbóltskappingin millm skipini er nakað, sum sjómenninir plaga at ganga høgt uppí og leggja nógv fyri, at vera við til.**

SJÓMANNAKAPPING
*Orð & myndir: Dávur Winther*

Nógv prát og nógv git var millum manningarnar í KÍ høllini í Klaksvík í gjár, sum er millum heilar 17 bátar, og sum manna 24 bólkarnar til kappingina.

Onkur mælskur reiðari var eisini millum áskoðarnar.

- Eg eri hjálparvenjari, tók hann til við einum smíli. Men hann gekk høgt uppí uppgávuna, og lat teir vita av, tá ið teir ikki skutu upp á mál, sum hann beyð.

Tá ið dyrturin vað liðugur, gav hann av grovfílini:

- Tit eru góðir, men tit orka ov illa at renna!

- OK, var ein av manningini skjótur at svara aftur - gev okkum so eitt rennibiband á brúnna!

Og so var alt látur og gott lag.

Hetta er 10. árið, at skipað verður fyri slíkari innandura fótbóltskapping millum jólana. Polarhav, Sundaberg, Norðborg og Jákup B. eru komnir víðari.

Úrslitið á kappingini var hetta:
1. Skálaberg
2. Sundaberg
3. Jákup B
4. Norðborg


FRELSUNAR-HERURIN



HERBERG FRELSUNARHERSINS

**TØKK**

Vit vilja takka fyri allan stuðul til Herberg Frelsunarhersins.

Takk fyri umhugsan og bønir.

Takk til handlar, fyritøkur, skip og einstaklingar fyri gávur, mat og peningagávur latnar Herberginum.

Harrin vælsigni tykkum og gevi tykkum ríka signing afturfyri.

**Øllum verður ynskt eitt eydnuríkt nýggjár.**

**Frelsunarherurin**



TVØROYRAR KOMMUNA

## Dagrøktarmamma

Dagrøktin í Tvøroyrar kommunu søkir eftir dagrøktarmammu, til dagrøktina á Tvøroyri at byrja sum skjótast,

Nærri fast at vita um starvið, á heimasíðuni hjá Tvøroyrar kommunu www. tvoroyri.fo

ella ringja til

Súsannu Poulsen
Dagrøktarleiðari
Tlf. 28.13.39
frá kl. 9.00 til 16.00
gerandisdagar



## Skrivstovustarv

**á Fjarskiftis-, Post-, Elveitingar-, Tryggingar- og Kappingareftirlitinum**

Søkt verður eftir einum skrivstovufólki til tvørgangandi skrivstovuuppgávur á Fjarskiftis-, Post-, Elveitingar-, Tryggingar- og Kappingareftirlitinum.

Eftirlitini halda til á Skálatrøð 20 og eru skipað sum stovnar undir Vinnumálaráðnum við felags stjóra og felags skrivstovuhaldi. 13 fólk starvast á eftirlitunum. Harumframt eru ráðgevar knýttir at stovnunum.

**Tín førleiki:**
Vit vænta at tú hevur:
- skrivstovuútbúgving ella royndir, sum kunnu javnsetast við skrivstovuútbúgving
- royndir innan almenna umsiting
- góðan kunnleika til føroyska, danska og enska málið
- góðan telduførleika
- góð samstarvsevni og ert fyrikomandi
- evni at arbeiða sjálvstøðugt og ert málsøkin

**Tínar arbeiðsuppgávur:**
Arbeiðið fevnir um:
- ymiskar skrivarauppgávur fyri stjóra, ráðgevar og fulltrúar
- post-, teldupost-, og telefonavgreiðsla
- røkja heimasíður
- standa fyri innkeypi
- annað vanligt skrivstovuarbeiði á stovnunum

**Vit bjóða tær:**
Eitt spennandi starv, sum tú sjálv-/ur er við til at skapa, umframt at kunnu bjóða tær góðar skeiðs- og eftirútbúgvingvarmøguleikar. Starvsfólkini á teimum ymsu eftirlitunum arbeiða í ávísan mun við tvørgangandi uppgávum innan ymsu økini, og kemur tú at starvast saman við dugnaligum starvsfeløgum í einum óformligum starvsfólkaumhvørvi, har avbjóðandi uppgávur verða loystar.

**Løn – og setanartreytir:**
Starvið er lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi fakfelag. Setanin fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí, umframt Løgmansskrivstovuna og hini aðalráðini.

**Umsóknir:**
Hevur starvið tín áhuga, ert tú vælkomin at senda umsókn saman við prógvum, viðmælum o.ø. til:
Fjarskiftiseftirlitið
Skálatrøð 20
Postboks 73
FO-110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 11. januar 2010, kl. 12.

Um tú ynskir nærri upplýsingar um starvið, er tú vælkomin at seta teg í samband við: Jógvan Thomsen, stjóra, tlf. 356021, teldupost jt@fse.fo ella Eyð Hansen, journalleiðara, tlf. 356026, teldupost eh@fse.fo

Meira fæst at vita um stovnarnar á: www.fse.fo, www.kapping.fo, www.tryggingareftirlit.gov.fo

FJARSKIFTIS EFTIRLITIÐ
TELECOMMUNICATIONS AUTHORITY